DAGSINS MEINING

Alneyðugar broytingar á íbúðarøkinum

Í útvarpinum týskvøldið hoyrdu vit um ætlanirnar hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, at fáa ein skipaðan íbúðarpolitikk.

Tað er at fegnast um, at landsstýrismaðurin stingur út í kortið broytingar, og so er at vóna, at tað ber ávøkst, tí higartil hevur slíkt bara verið tos.

Hóast føroyingar hava hildið, at tað at seta føtur undir egið borð var at byggja sær síni egnu hús, so er veruleikin meira fjølbroyttur. Men í Føroyum hevur alternativið verið privati leigumarknaðurin, sum ikki hevur verið serliga væl skipaður.

Ætlanirnar nú eru at gera lóg um lutaíbúðir, at fólk, kommunur, felagsskapir o. o. kunnu taka seg saman og í felag byggja lutaíbúðir, sum fólk so kunnu keypa sær brúksrætt til. Hesa skipan kenna vit væl eitt nú úr Danmark, men hetta hevur ikki borið til í Føroyum.

Ymsar tekniskar broytingar skulu til, eitt nú skal lógin um MVG broytast og lógin um rentustuðul, so slíkar ætlanir fáa somu sømdir, sum fólk fáa til privatar íbúðir.

Hetta er eitt gott politiskt signal, sum vit heilsa vælkomnum, tí okkum tørvar ein meira fjølbroyttan íbúðarmarknað, tí í dag einki alternativ til privata sethúsabygging uttan privati, óskipaði leigumarknaðurin.

Landsstýrismaðurin ætlar eisini at nútímansgera leigulógina, sum er frá 1940. Vert er at geva gætur, at tað einans er í Havn, at vit hava eina leigunevnd, hóast hon fyri tey flestu leigumálini ongan týdning hevur, tí fá leigumál verða send nevndini.

Borgarstjórin í Havn ávaraði landsstýrið ímóti at gera broytingar, sum fóru at gera tað truplari hjá útleigarum. Hetta eigur landsstýrið sjálvandi at hava í huga, men marghátligur ótti, kortini. Um skipað viðurskifti skerja møguleikarnir fyri at leiga út íbúðir, so er tað besta tekini um, at vit skjótast gjørligt fáa eina brúkiliga leigulóg.

Hetta skal kortini ikki skiljast so, at útleigarar hava tað alt ov gott og gera sær dælt av støðuni. Tað er hugsandi, at onkur ger tað, men vit skulu ikki skera øll yvir ein kamb. Tað eru nógvir seriøsir útleigarar, og teir eiga so avgjørt at verða tiknir upp á ráð. Men ein leigulóg er sjálvandi bæði fyri leigara og útleigara – hon skal ganga báðar vegir. Men tað týdningarmesta er tó, at vit fáa skipað viðurskifti.

Megnar landsstýrismaðurin hesini málini, so røkist fyri, at vit veruliga kunnu rokna við einum fjølbroyttari íbúðarmynstri í Føroyum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Illvøkstur

Hergeir Nielsen

Enn eina ferð síggja vit Jacob Vestergaaard planta eitt prógv í bløðunum.

Hesuferð verið eg lagdur undir at verja eina niðurgerð móti kommununum í Suðuroynni. Prógvið hjá ákæranum er eitt skjal, sum landsbókavørðurin hevur skrivað, og sum ákærin ger alment.

Skjalið havi eg ongantíð sæð, orðingarnar havi eg ongantíð lisið, og landsbókavørðin havi eg ongantíð havt nakað samband við um hetta mál.

Havi einans verið á einum felags fundi í Øravík, hagar tingmenn vóru bodnir, og har Jacob Vestergaard boðaði frá, at hann var ímóti at fremja málið um meginbókasavnið.

Nakrar orðingar hjá landsbókavørðinum verða nú gjørdar til mínar og sagt verður, at eg átti at átala henda ágang móti kommununum.

Til hetta er stutt at siga, at torført er at átala ein ágang, sum tú einki kennir til.

Orðingarnar hjá triðjapersóni eru mær ikki kunnugar. Tær eru mær óviðkomandi, og eg havi ongantíð sæð tær fyrr enn nú, tær standa á prenti í bløðunum.

Skuldsetingarnar eru tí at javnmeta við høpisleysu skuldsetingarnar móti lærararáðanum við miðnámsskúlan, sum Jacob Vestergaard segði hava samtykt at vera ímóti savninum.

Jacob Vestergaard man hava sæð ov nógvar biligar kriminalfilmar, og setur seg ov lítið inn í veruligu viðurskiftini.

Hann plantar prógv her og har, og slotar síðani eftir møguleikum fyri at fella dóm upp á falskar fortreytir.

Nær hann gevst við hesum virksemi sínum er ikki gott at vita, men tað er við at gerast leiðiligt at svara fleiri álopum av hesum slag.

Hví lýgur løgmaður á sínum fyrsta tíðindafundi

Bill Justinussen
løgtingsmaður

Hevur samgongan so ilt av sínum lyftum um sparingar í miðfyrisitingini, at løgmaður beinleiðis verður noyddur at lúgva fyri at fáa myndina at síggja betri út? Á tíðindafundinum varð upplýst, at kostnaðurin fyri Almanna- og heilsumálaráðið var lækkaður úr 27 mió. niður í 20 mió. krónur, síðani hendan samgongan hevur tikið við. Sum tíðindini í Úrvarpi Føroya bóru hetta fram, so var ikki eitt orð sagt um, hvussu komið varð fram til hetta úrslitið. Men tað kann eg so gera, fyri at fáa hetta mistakið rættað.

Elektronisk heilsuskipan

Undanfarna samgonga setti 5 mió. av til útvegan av elektroniskari heilsuskipan. Hetta er ein skipan, sum umfatar alt heilsuverkið og partar av almannaverkinum, og var tað tí náttúrligt, at hendan útreiðslan varð løgd beinleiðis undir landsstýrismannin heldur enn undir eitt nú landssjúkrahúsið ella landsapotekaran. Sostatt var hendan útreiðslan ein partur av útreiðslunum til miðfyrisiting. Men hetta er ein útreiðsla, **sum onki hevur við miðfyrisitingina at gera**, men sum av praktiskum orsøkum varð løgd til miðfyrisitingina at umsita. Útreiðslan snýr seg ikki um fleiri almenn størv ella útbygging av nøkrum almennum kongaríki, men um eina ítøkiliga menningarætlan, sum alt ov leingi hevur verið bíðað eftir. Hesa útreiðslu hevur núsitandi samgonga skotið út til komandi ár og komandi árini, og tí er **als ikki talan um sparing.** Útreiðslan kemur, og tað hevur tingið enntá eftir uppskoti frá núsitandi landsstýrismanni samtykt. Í ár er bert ein góð hálv millión sett av til hetta endamálið.

Lygnin

Har vóru altso slakar 5 mió, sum ikki eru spardar, og sum heldur ikki hava nakað við miðfyrisitingina at gera, so sum vit vanliga uppfata útreiðslur til miðfyrisiting. Um aðrar lygnir eru í **sparipakkanum** hjá løgmanni, veit eg ikki enn, men tað fari eg at kanna. SO LÆTT KANN EIN LØGMAÐUR IKKI FARA UM SANNLEIKAN!

Sparingin

Tó skal sigast, at ein ítøkilig sparing er: nú eru bert 7 landsstýrismenn í mun til 9. Men framvegis verða goldnar 9 aðalstjóralønir, tí teir uppsøgdu aðalstjórarnir fáa mær vitandi framvegis aðalstjóraløn, so har varð lítið spart. Enntá vórðu 2 spildurnýggj størv stovnað til hesar báðar aðalstjórarnar.

Hvar er Fólkaflokkurin?

Eg havi áður spurt og fari framvegis at spyrja; hvar er Fólkaflokkurin í øllum hesum kritikkinum av áður førda politikkinum. Fólkaflokkurin sat við landsins leiðslu í 6 ár, og tykist tað tí sera løgið, at hesin flokkur nú bráðliga skal sita hinumegin borðið og ferð eftir ferð fílast á sín egna politikk. Men soleiðis er so mangt forborgið í politikki.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fríggj. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Eru útlendingar í Føroyum?

Nú tosað verður um at broyta útlendingalógina

Birgir W Høgnesen

Tað kann tykjast eitt sindur undrunarsamt fyri vanliga borgaran, tá ið politiska skipanin nú er farin at viðgera útlendingar, tí tað er ikki dagur frá Gudi, at vit ikki møta útlendingum, sum passa sera væl inn í okkara »serføroyska« arbeiðsmarknað.

Vil av góðum grundum ikki koma inn á skipanina við ítróttarfólkum á hesum sinni, tí á mangan hátt er júst tað orðaskiftið fara av kós. Ongin ivi er um, at Jógvan við Keldu avgreiðir hatta við smidligheit, um eg kenni hann rætt.

Flesum kunnugt er skipanin soleiðis háttað, at norðurlendingar hava frítt at ferðast og arbeiða í londunum hjá hvørjum øðrum.

Aðrir útlendingar mugu hava innferðarloyvi og arbeiðs- og uppihaldaloyvi fyri í heila tikið at vera í Føroyum.

Á ymsan hátt eru vit í føroyingar nær tengd at útlendingum, um enn onkur innast inni hevur eina meining, um at hesi heldur átti at hildið seg í sínum egna heimalandi.

Men um vit vilja tað ella ei, so umgangast vit útlendingar hvønn dag. Eg haldi ikki, at teir eru so nógv annarleiðis enn vit føroyingar og so slettis ikki nøkur hóttan í gerandisdegnum.

Her í Vestmnanna livir bygdarfólkið við útlendingum sum um einki var hent, ikki tí vit ikki geva okkum far um teir, men heldur er tað tí, at teir eru vorðnir ein vanlig gerandismynd.

Í Vestmanna búgva í løtuni fólk úr Australia, Ný Sælandi, Tailandi, Japan, Rumenia, Danmark, Mexico, Keynia, Russlandi, Týskalandi og so harumframt okkara kendu ítróttarfólk úr Romenia.

Hvør í Vestmanna vildi sent australiu-kvinnuna í ferðavinnuni ella tailensku mammuna, sum arbeiðir á Fiskavirking, ella japanan sum í áratíggir hevur arbeitt á mjólkarvirkinum av landinum. Nei, eg meini so við, hasar tankarnar hava vit ikki.

Hesi fólkini skapa sína tilveru á egnan mátt og megi, og á sín egna hátt og genera ongan. Tey klára seg og síni, uttan at tey síggjast nevnivert í samfelagnum.

Tá ið foreldur í Vestmanna avlevera síni børn á dagstovn í Miðalsbrekku í Vestmanna, møta tey eini myrkari fittari Australskari kvinnu, sum tekur ímóti teirra børnum, men tað er so eiðasørt at foreldrini hugsa um, at hon ikki er føroysk.

Eg haldi, at orðatakið at vit síggja flísini í annara eygum, men ikki bjálkan í okkara egnu, er farin at hóska til føroyingar, tí vit eru ov erkvisnir í útlendingamálum. Hvussu nógvir føroyingar fóru ikki burtur í lond í 90-unum og vórðu væl móttikin har tey komu.

Nú havi eg bara skrivað um Vestmanna omanfyri, men hvussu eru Føroyar fyri, tá vit hugsa um útlendingar. Vit kundu leysliga farið í gjøgnum almennar og hálvalmennar stovnar og aðalaráðini.

Tað almenna

Longu á **Løgmansskrivstovuni** finna vit australsku Kate Sanderson, fulltrúa.

Í **Vinnumálaráðnum** finna vit landsdjóralækna, danan Bjørn Harlou, og í **Oljumálaráðnum** finna vit teir báðar, danan Tommy Petersen, sum er ráðgevi, og norðmannin Alex Buvik, sum er trygdarleiðari.

Øll minnast vit setanina av dananinum Steffan Stumman Hansen, landsfornføðingi, sum er settur av **Mentamálaráðnum**, og í Mentamálaráðnum er eisini ein annar dani, Claus Reistrup, sum er Undirvísingarleiðari; ein av deildarleiðarunum á **Toll & Skatt** er danin Kurt Madsen.

Í Landsbanka Føroya arbeiða tveir útlendingar, um eg ikki minnist skeivt, í tí almenna Føroya Tele situr ein dani, Tage Iversen, í nevndini.

Á skrivstovuni hjá Atlantic Airways er sølu- og marknaðarleiðarin danin Kent Kristensen og í nevndini situr íslendingurin Petur J. Eiriksson.

Í beinleiðis framhaldi av Fíggjarmálastýrinum hevur Fíggingargrunnurin frá 92 sett danan Jørn Astrup Hansen, sum stjóra í Føroya Banka, sum eisini er nevndarformaður í Elektron.

Privata o.a.

Á tí privata arbeiðsmarknaðinum kunnu vit eisini fara í landbúnaðin, t. d. MBM, har situr Íslend-ingurin Eirikur Thorvaldson sum stjóri, og marknaðarleiðarin søluføkir eru og har er danir.

Bara fyri at nevna nøkur sum vit kenna heilt væl í almennum samanhangi, so kunnnu vit fara í **Norðurlandahúsið, har er íslendingurin Helga Hjørvar stjóri.**

Smyril Line setti fyri kortum nýggjan marknaðarstjóra, hann er dani, og ein nevndarlimur er hetlendingurin Morgan Goodlad.

Í nevndini hjá telefonfelagnum Kalli sita tveir íslendingar, Halvor S. Snarvold og Oskar Magnusson.

Hvør kennir ikki útlendingarnar Arne Nørrevang og Dorete Block, restauranteigararnar Mouldi og Nordin Manai, alt vanligir borgarar, sum vit ikki geva okkum far um, men sum eru útlendingar.

Á øðrum økjum hava vit valt at hava »leysar« útlendingar í starvi t. d. Hendrik Larsen venjara á fótbóltslandsliðnum og seinasta árið Lars Nedergaard á hondbóltslandsliðnum.

Eg kundi nevnt fleiri sjálvandi, men í tónleikaverðini eru nógv fólk, sum koma úr londum uttan fyri norðanlond. Hesi fólk, sum so nógv er brúk fyri, tí tey ríka okkara tónleikamentan eru Anette Nielsen úr Týskalandi, Claire Lydon Thomsen úr Onglandi, Katja Volovelskaja úr Ruslandi, Kenneth Jones úr Wales, Kenneth Mcleod úr Skotlandi, Ljudmila Berezina úr Ruslandi, Martin Pollard úr Onglandi, Monika Stauss Joensen úr Sveis, Nikos Kapnas úr Grikkalandi, Sharon Weiss úr Amerika, Steven Foggin úr Onglandi og helst eru tað fleiri, sum ríka tónleikin, men sum vit ikki geva okkum far um í dagliga degnum. Men eitt er vist, vóru tey send av landinum, so vóru tey ein mangul í føroyska samfelagnum.

Hava vit føroyingar nakrar trupulleika við útlendingum, kundi ein spurt? Sum tað sæst omanfyri, so liva vit í tí saligu trúgv, at vit hava ongar útlendingingar búgvandi.

Men myndin sær annarleiðis út, tí staðfest er, at Føroyar hava helst heimsmet í útlendingum í mun fólkatalið, og so kann ein spyrja, hevur hetta gjørt Føroyar til eitt verri land, nei so avgjørt ikki, heldur tvørturímóti.

Tá eg vaks upp í Klaksvík vóru nøkur serlig tónleikafólk í býnum. Hesi vóru Alex Sólstein, Sámal Petersen og ikki at gloyma Jógvan við Keldu. Eg minnist hvussu Jógvan ríkaði tónleikalívið á so mangan hátt við klaverspæli og sum kórleiðari.

Myndin omanfyri vísur, at útlendingar í tónleikavinnuni rúgva mest upp í útlendingamálum og so eru tey enntá ikki norðurlendingar. Góði Jógvan, minst nú til, at tónleikalívið tekur hesi fólkini, tí tey liggja inni við eini vitan, sum kann menna føroyska tónleikalívið.

Tað sær út til, at vit hava brúkt nógv útlendsk fólk í almennu umsitingini, í tónleikalívinum og í almennum og hálvalmennum nevndum og ráðum, so tað almenna gongur undan í so máta. Bert spell, at ítróttarfeløgini ikki fáa sama møguleika sum tað almenna. Eg skal í hvussu so er bjóða øllum, sum eru nevnd omanfyri hjartaliga vælkomin, vit vita at tit ikki skaða Føroyar á nakran hátt, heldur tvørturímóti.

Spurningar um tubbak

Klipp spurnablaðið úr blaðnum. Skriva rætta svarið í spurnarblaðið, skriva navn og bústað og send spurnarblaðið til:

Fyribyrgingarráðið
Postsmoga 135
FO-110 Tórshavn

Spurnablaðið skal vera Fyribyrgingarráðnum í hendi í seinasta lagi 28. mai.

Hvør luttakari kann bara senda eitt spurnarblað til kappingina, og er aldursmarkið 18 ár. Drigið verður millum spurnarblaðini, ið eru rætt svarað, á Torginum í SMS á Altjóða Roykfría degnum, leygardagin 29. mai kl. 13.00.

Harumframt hava tey, ið vitja básin hjá Fyribyrgingarráðnum altjóða roykfría dagin, eisini møguleika fyri at luttaka í kappingini. Spurnarblød eru at fáa í básinum hjá Fyribyrgingarráðnum 29. mai í SMS, men tey mugu verða útfylt og leverað til kappingina í seinasta lagi kl. 12.30.

Fyrsta spurnarblaðið, ið verður drigið og sum er rætt svarað, vinnur eina vikuskiftisferð fyri tvey til Reykjavíkar ella Aberdeen og aftur við Atlantic Airways annar vinningur verður ein gáva frá Almanna - og heilsumálaráðnum og triði vinningur verður eitt gávukort á 1000 kr. frá SMS.

Fyribyrgingarráðið
www.fyribyrg.fo
Spurnarkapping

7. At roykja sigarettir, sigarir og pípu økir um vandan fyri krabba á vørrum, í munni og niðri í hálsi.
   _ rætt
   _ rangt

8. Hvussu leingi skal ein ungur roykja aðrenn hann sýnir eyðkenni til at verða bundin til tubbak:
   _ A) Nakrar fáar vikur
   _ B) Fleiri mánaðar
   _ C) Fleiri ár

9. Hvussu nógv hevur ein fjúrtan ára gamal/gomul, sum roykir 10 sigarettir um dagin, brúkt, tá ið hann/hon er 20 ára gamal/gomul (eftir 6 árum)?
   _ A) 5.670 kr.
   _ B) 11.910 kr.
   _ C) 25.700 kr.
   _ D) 38.325 kr

10. Skal sleppast undan vandanum, umvegisroykjarum verður fyri, ber til at:
    _ A) lata vindeygað upp
    _ B) gera serligt øki til roykjarar
    _ C) roykja á einari skrivstovu og lata hurðina vera afturlatna
    _ D) útihýsa allari royking innandura

13. At anda djúpan og gera venjingar kann hjálpa tær at gevast við at royka.
    _ rætt
    _ rangt

14. Helvtin av øllum roykjarum vóru longu byrjaði at roykja, tá ið tey vóru:
    _ A) 14 ár
    _ B) 18 ár
    _ C) 20 ár
    _ D) 25 ár

Navn: _____
Bústaður: _____
Telefonumar: _____
Aldur: _____

Góða eydnu við svarunum!